Dimmalætting

6 kr.

111. ÁRGANGUR

NR. 39 HÓSDAGUR 7. APRÍL 1988.

# Presturin út – prestafrúan inn

**Mikudagin fyri páskir varð samgongan lappað saman aftur við Karolinu Petersen úr Framsóknarflokkinum, sum kom inn fyri Niels Paula Danielsen úr Kristiliga Fólkaflokkinum. Karolina Petersen skal hava sosialmál undir sær.**

Kynsstríðið tykist nú at vera av á hesum sinni, og um ongin »bumba« kemur aftur á tingborð, situr nýggja samgongan til val verður um gott hálvt ár.

Mikudagin í síðstu viku varð Karolina Petersen vald til landsstýriskvinnu samstundis sum landsstýrismaður Kristiliga Fólkaflokksins, Niels Pauli Danielsen, segði farvæl. Samgongan er nú skipað av Javnaðarflokkinum, Tjóðveldisflokkinum, Sjálvsstýrisflokkinum og Framsóknarflokkinum.



**Framsóknarflokkurin er nú komin upp í samgonguna. Karolina Petersen og Adolf Hansen avmyndað eftir at Karolina er vorðin vald sum landsstýriskvinna. Framsóknarflokkurin hevur treytað sær, at uppskotið um broytingar í revsilógini fær juridiska viðgerð í landsstýrinum, áðrenn tað kann koma á tingborð.**

Kristiligi Fólkaflokkurin segði seg vera noyddan at bróta samstarvið við hinar flokkarnar, orsaka av tveimum lógaruppskotum sum løgd vóru fram fyri tingið og sum flokkurin var ímóti. Hvørki javnstøðulógaruppskotið ella uppskotið um broytingar í revsilógini viðvíkjandi homosexuellum, kundi flokkurin taka undir við og noktaði hann, at tey vórðu løgd fram til atkvøðugreiðslu.

Í fleiri dagar stóð samgongan og rillaði millum semju, slit og nýval. Kristiligi Fólkaflokkurin hótti við at slíta, um uppskotini bæði ikki vóru tikin úr aftur løgtinginum, men løgmaður boðaði frá, at uppskot sum eru til viðgerar, ikki kunnu takast úr aftur tinginum. Tó stóð flokkinum frítt at stilla mótuppskot, um hann vildi.

Niels Pauli Danielsen valdi so at siga landsstýrissamstarvið upp, samstundis sum Framsóknarflokkurin segði seg hugaðan at koma upp í samgonguna, tó við ávísum broytingum. Flokkurin krevur, at uppskotið um at verja homosexuell móti diskriminering, verður lagt til juridiska viðgerð í landsstýrinum, áðrenn tað kemur á tingborð til endaliga atkvøðugreiðslu. Hesum hava hinir samgonguflokkarnir játtað.

Á fundi seinasta mikudag varð Karolina Petersen so vald til landsstýrisumboð fyri Framsóknarflokkin, mánadagin fór hon so til arbeiðis í nýggja starvi sínum.



**Niels Pauli millum Lassa og Tord seinasta starvsdag sín sum landsstýrismaður. Kristiligi Fólkaflokkurin segði landsstýrissamstarvið upp, orsaka av tveimum lógaruppskotum, sum bæði hava til endamals at forða fyri diskriminering.**

Karolina Petersen kemur at hava sosialmál undir sær, og á hesum øki hevur hon eisini fleiri royndir. Tað var hon sum setti á stovn endurútbúgvingarskúlan við Áir, har hon er leiðari. Tvey vistarheim, annað í Havn og hitt í Runavík, hevur hon eisini fingið í lag.

oz